

## Fleiri kvinnuligir stjórar

Alt lívið ígjøgnum velja kvinnur og menn ymiskt. Hesi val byrja longu tíðliga í skúlanum, tá fak skulu veljast og seinni, tá lestrarlinja skal veljast. Hesi val hava havt týdning fyri, hvar kvinnur og menn eru endað í lívsyrki sínum, og hvør hevur sitið í stjórastólunum. Í dag velja kvinnur oftari lesnað, sum áður hevur verið mansdomineraður. Tað fer í framtíðini at merkja, at fleiri kvinnur enda í stjórastólinum enn vit fyrr hava sæð, skrivar Boersen.dk.



*- Nú gongd er komin á aftur hjá føroysku alivinnuni, og eftirspurningurin eftir fóðuri soleiðis er vaksin, brúktu vit at kalla alla orkuna á virkinum í fjør til at nøkta tørvin á heimamaknaðinum, sigur Odd Eliasen, leiðari á fóðurdeildini hjá Havsbrún*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Rávøran, sum skipini føra til lands, er grundarlagið undir mjøl-, lýsi-og fóðurframleiðsluni hjá Havsbrún í Fuglafirði*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Alifóður úr sama fiski sum villur laksur etur

**Havsbrún í Fuglafirði hevur egna starvsstovu, sum hevur neyvt samstarv við granskingarstovnar bæði úti og heima. Miðvísi góðskupolitikkurin hevur givið virkinum altjóða viðurkenning sum eitt framkomið fiskamjøls- og fóðurvirki**

HAVSBRÚN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rávøran, sum Havsbrún í Fuglafirði keypir, verður avroknað eftir dygd og innihaldi, og virkið setir sera strong krøv til fiskin, sum er grundarlagið undir allari framleiðsluni.

Miðvísa góðskingararbeiði hjá Havsbrún hevur vunnið frama uttanlands og starvsstovan, sum virkið hevur, tryggjar í neyvum samstarvi við føroyskar og útlendskar granskingarstovnar eins og alarar, at vøran, sum virkið selir, er fyrsta floks.

Framleiðslan er fiskamjøl, lýsi og alifóður.

Við tað, at Havsbrún keypir fiskin og framleiðir sína egnu rávøru, sum verður brúkt til alifóður, serliga fóðurmjøl og lýsi, hevur virkið møguleikar sum eingin annar at velja tað besta mjølið og lýsið til sína fóðurframleiðslu.

Fiskamjølið og lýsið í fóðrinum hjá Havsbrún stavar frá somu fiskasløgum, sum villur laksur náttúrliga etur, og tað er ikki minst hetta, sum tryggjar alifiskinum best møguligar vakstrarmøguleikar.

– Sjálvandi kunnu vit keypa hesa rávøru fyri somu prísir, sum okkara kappingarneytar keypa hana fyri. Vit eru sum so ikki í verri støðu enn teir, leggur hann aftrat.

### Sera framkomið

Odd Eliasen, sum hevur starvast á Havsbrún í meira enn 20 ár, vísir á, at hetta er eitt sera framkomið virkið, sum avgjørt ikki nýtist at tapa í kappingini við onnur virki av hesum slagi.

– Vit hava eitt toppmodernað virkið, sum hann tekur til.

Á fóðurdeildini starvast eini 20 fólk burtur av í hesi framleiðslu.

Samlaða talið av ársverkum á Havsbrún hevur í fleiri ár ligið millum 90 og 100, og eitt nú í 2003 og 2004 lá talið beint omanfyri 100.

### Havsbrún – ein risi

Í føroyskum vinnulívshøpi er Havsbrún ein risi, um vit so kunnu siga.

Sølan av úrdráttum hjá virkinum hevur í fleiri ár ligið millum slakar 400 miljónir krónur og upp í slakar 700 miljónir krónur um árið.

Árligu ráfiskanøgdirnar, sum virkið keypir til sína framleiðslu, hava okkurt árið ligið omanfyri 300.000 tons, men í løtuni bendir mangt á, at virkið ikki kann vænta sær so nógvan fisk tey komandi árini.

Rakstrarliga hevur Havsbrún eisini staðið seg rættiliga væl í fleiri ár – við rímiliga stórum avlopum á hvørjum ári.

# alifeløgum

an pening, tá eitt nú sjúka og hareftir húsagangir raktu alivinnuna, var virkið í Fuglafirði so mikið væl konsoliderað fíggjarliga, at tað var ført fyri at hjálpa alivinnuni á føtur aftur.

Um hetta mundið keyptu útlendsk feløg seg eisini inn í føroysku alivinnuna og hjá Havsbrún, sum er stórur veitari av alifóðuri, sóu tey seg noydd til at keypa seg inn í vinnuna fyri at tryggja sín marknaðarpart.

Tó at rávøran til framleiðslu av mjøli og lýsi, sum eitt nú er grundarlagið undir alifóðuri, er minkandi, eigur Havsbrún eingi skip, sum eiga kvoturættindi og soleiðis kunnu tryggja virkinum eina part av neyðugu rávøruni.

Stjórin á Havsbrún, Bergur Poulsen, hevur verið avgjørdur og hevur sagt, at felagið fer ikki at gera íløgur í svartkjaftaskip fyri at tryggja sær rávøru.

Hann hevur áður víst á, at Havsbrún fer at halda seg til tað, sum felagið dugir best, og tað er at framleiða mjøl, lýsi og fóður.

– Vit hava eitt sera framkomið virki, sum vit trúgva uppá, og tí trúgva vit eisini upp á framtíðina, tó at tað sær eitt sindur trupult út við rávøru í løtuni, sigur Bergur Poulsen, stjóri.